Fylgiskjal 7

Hoyringarnotat um uppskot til løgtingslóg um nýggja løgtingslóg um tøkugjald.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið sendi tann 5. apríl 2024 uppskotið til hoyringar hjá viðkomandi myndugleikum og feløgum. Hoyringarfreistin var tann 21. apríl 2024, á midnátt.

Hesir myndugleikar og feløg fingu uppskotið til hoyringar:
Bakkafrost, Hiddenfjord, Mowi, Havbúnaðarfelagið, Landsbankin, Fíggjarmálaráðið, Fróðskaparsetur Føroya og Vinnuhúsið.

Uppskotið hevur eisini ligið frammi til hoyringar á heimasíðu Uttanríkis- og vinnumálaráðsins og á hoyringarportalinum hjá landsstýrinum.

Hesir myndugleikar og feløg hava sent inn viðmerkingar til uppskotið:

- Havbúnaðarfelagið
- Fíggjarmálaráðið
- Fróðskaparsetur Føroya
- Landsbankanevndin
- TAKS

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til hoyringarsvarini:

Havbúnaðarfelagið

Yvirskipað mælir felagið frá, at lógin verður broytt samsvarandi verandi uppskoti. Í staðin mælir felagið enn einaferð til eina skipan, ið einans byggir á skattliga úrslitið hjá vinnuni.

Í hoyringarsvarinum verða fleiri viðurskifti viðgjørd! Talan er um fylgjandi:

- Tøkugjaldið eigur at verða grundað á skattliga úrslitið
- Gjalda meir, tá vinnan tjenar min
- Vinnan harðari skattað enn kappingarneytar
- Versnandi kappingarføri
- Óstøðugir karmar
- Ov høgt tøkugjald ávirkar møguleikarnar at gera íløgur

Tøkugjaldið eigur at verða grundað á skattliga úrslitið

Viðvíkjandi sjónarmiðinum at loyvisgjøld eiga at taka støði í skattliga úrslitinum, verður víst á, at ein skattlig skipan tryggjar, at vinnan bert skal gjalda tøkugjald, tá søluprísurin er omanfyri framleiðslukostnaðin.

Eisini verður víst á at ein skattlig skipan tekur hædd fyri, at firðirnir eru ymiskir og at ymisk alitøkni hevur ymiskan framleiðslukostnað. Ein skattlig skipan forðar ikki fyri nýskapan og harumframt er ein slík skipan neutral, tá ið talan er um at gera íløgur. Víst verður eisini á, at ein skattlig skipan er einasti háttur, sum ikki virkar atferðarstýrandi fyri vinnuna.

Í hoyringarsvarinum verður eisini víst á, at limir felagsins eru av teirri fatan, at einki gjald eigur at vera, tá framleiðslukostnaðurin er hægri enn altjóða marknaðarprísurin.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Sjónarmiðini hjá Havbúnaðarfelagnum eru vælkend og hava áður verið førd fram í sambandi við broytingar í tøkugjaldinum. Í politisku skipanini hevur í fleiri landsstýrisskeið verið semja um eina skipan, har partur av tí, sum alivinnan skal rinda landinum, skal vera umvegis tøkugjaldið, sum verður tikið í fyrsta liðið.

Tilgongdin at fáa í lag eina breiða semju hevur eisini staðfest, at tað framvegis er breið politisk semja um eina skipan við tøkugjaldi. Harvið er ein tvíliðað skipan eitt kompromis fyri at tryggja vinnuni støðugar karmar.

Við eini reinari skattaskipan, har rindað verður av úrslitinum, gera fyritøkurnar í ávísan mun av, hvussu nógvan skatt vinnan rindar. Við at tillaga íløgur, avskrivingar, innanhýsis handlar og onnur viðurskifti, ber til at ávirka úrslitið, sum skattur skal gjaldast av. Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur áður víst á hesi viðurskifti. Í hoyringarnotatinum til hoyringarsvarið hjá Havbúnaðarfelagnum í sambandi løgtingsmál 093/2022, varð víst á, at óvissan við eini skipan við eyka partafelagsskatti var ein av orsøkunum til, at vit fingu eina skipan við loyvisgjaldi (tøkugjald).

Hinvegin kann skipanin við eini tvíliðaðari gjaldsskipan fyri alivinnuna eisini metast sum eitt stig rætta vegin í mun til at rinda ein størri part av tilfeingisrentuni fyri framíhjárættin umvegis skattaskipanina.

Landsstýrið metir ikki, at nýggja skipanin ger, at alifyritøkurnar ikki eisini frameftir fara at kunna gera munadyggar íløgur, ið bæði kunnu økja um og tryggja burðardygga aling.

Í mun til sjónarmiðið um at einki gjald eigur at vera, tá framleiðslukostnaðurin er hægri enn altjóða marknaðarprísurin, so hevur grundreglan frá byrjan verið, at vinnan altíð eigur at gjalda nakað fyri framíhjárættin. Landsstýrið hevur tískil ikki ætlanir um at fremja broytingar hesum viðvíkjandi.

Gjalda mest, tá vinnan tjenar minst

Í hoyringarsvarinum verður ført fram, at uppskotið hækkar munandi um skattin, um feløgini ikki fara at hava stór avlop, men lækkar hinvegin um skattin, um avlopini gerast stór.

Víst verður á, at hetta kann hava stórar avleiðingar fyri vinnuna í framtíðini. Tað er serliga skatturin á fyrst tjentu krónu, ið verður hækkaður munandi. Sum orsakir verða nevndar, at framleiðslukostnaðirnir verða lækkaðir, tí at skotið verður upp, at sølu- og flutningskostnaðir til marknaðir ikki skulu takast við í uppgerðina av framleiðslukostnaðinum, og tí at serskatturin kemur afturat.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Stigini í tøkugjaldsstiganum í uppskotinum eru neyvt tey somu sum fýra tey fyrstu stigini í stiganum í galdandi løgtingslóg. Á tann hátt er ikki talan um eina munandi broyting. Hinvegin er tað rætt, at talan, heilt frá byrjan, tá ið tøkugjaldið varð skipað, hevur verið um eitt degressivt gjald.

Tað er undranarvert, at sjónarmiðið, at broytingin í uppgerðarháttinum av framleiðslukostnaðinum fer at økja um skattatrýstið, verður nýtt sum jarnbrot í hesum høpi, tá tað eru partar av vinnuni, ið áður hava víst á, at sølu- og flutningskostnaðir til marknað ikki eiga at vera partur av uppgerðini av framleiðslukostnaðinum.

Lógaruppskotið byggir á eina breiða semju millum samgonguflokkarnar og Sambandsflokkin, og sambært semjuni kunnu tillagingar og broytingar gerast um allir semjuflokkar eru samdir um tað. Um heilt serlig viðurskifti taka seg upp, ella ógvusligir stoytir raka alivinnuna, viðgera semjuflokkarnir semjuna og skipanina í felag.

Vinnan harðari skattað enn kappingarneytar

Í hoyringarsvarinum verður fært fram, at nýggja semjan fer at merkja, at føroyska alivinnan fer at verða harðari skattað enn norska og íslendska alivinnan.

Eisini verður fært fram, at hetta fer at steðga íløgum í vinnuni, og at vandi er fyri, at hetta fer at merkja, at samlaði skatturin sum frálíður fer at minka.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Í tilgongdini at fáa í lag eina breiða semju millum samgonguflokkarnar og sambandsflokkin hevur eitt atlit verið samlaða avgjalds- og skattatrýstið í Føroyum samanborið við tað í Norra.

Sambært norskum myndugleikum er effektivi tilfeingisskatturin 25%, meðan formliga skattaprosentið er 32,1%. Orsøkin er, at fyrst verður vanligur partafelagsskattur á 22% rindaður av úrslitinum hjá feløgunum. Síðani verður goldin partafelagsskattur drigin frá skattagrundarlagnum, sum er grundarlagið undir útrokningini av tilfeingisskattinum. Síðani verður skattað við 32,2%.

Við eini bruttuskipan, sum teirri føroysku, er trupult at meta um samlað skattatrýst av tí at "skattatrýstið" í stóran mun er knýtt at samlaða úrslitinum. Harumframt eru uppgerðarhættirnir av skattagrundarlagum sambært ávikavíst føroysku og norsku lóggávuni ymiskir, og hetta ger tað trupult at samanbera skipanirnar.

Versnandi kappingarføri

Havbúnaðarfelagið vísur á, at serskatturin og dagførdi uppgerðarhátturin av framleiðslukostnaðinum fara at minka um kappingarførið hjá føroysku alivinnuni.

Eisini verður í skrivinum víst á, at inntøkurnar frá eini skipan við tøkugjaldi økjast sum avleiðjng av príshækkingum í samfelagnum, uttan at marginan hjá alifeløgunum veksur samsvarandi. Sum frálíður kann hetta blíva ein avbjóðing.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Við uppskotinum verður stigin lækkaður munandi samanborið við verandi løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu. Tað eigur alt annað líka at vera ein bati. Ásannandi at smálutirnir í skipanini við einum serskatti ikki eru kendar enn, er torført endaligt at meta um avleiðingarnar á kappingarføri hjá alivinnuni.

Enn einaferð verður dagførdi uppgerðarhátturin av framleiðslukostnaðinum nýttur sum jarnbrot – víst verður til viðmerkingarnar hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til yvirskriftina: "*Gjalda mest, tá vinnan tjenar minst*" omanfyri.

Tað er rætt, at tøkugjaldið, soleiðis sum tað er snikkað, alt annað líka, yvir tíð fer at hækka. Hetta er nakað, ið politiska skipanin eigur at hava í huganum – og við jøvnum millumbilum eigur at meta um týdningin av.

Óstøðugir karmar

Í hoyringarsvarinum verður havt at tilgongdini í sambandi við, at skipanin ferð eftir ferð er vorðin broytt.

Samstundis verður víst á týdningin av støðugum kørmum, og at Havbúnaðarfelagið í útgangsstøði er fyri eini breiðari semju. Í hesum sambandinum verður víst á, at tað setur størri krøv til innihald, tá talan er um breiðar semjur, ið hava gildi í fleiri ár – eisini tá tað gongur minni væl í alivinnuni. Samstundis verður høvi nýtt til at gera vart við, at karmarnir, sum semjan leggur fyri vinnuna, hvørki eru tryggir ella gagnligir.

Ítøkiliga verður víst á skiftandi søluprísir, framleiðslukostnað og fóðurprís, sum fyritøkur ikki sjálvar hava, ikki eru tryggir karmar fyri vinnuna og at hesir eru atferðarstýrandi.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Flest øll kunnu verða samd um, at tilgongdin, ið mangan hevur verið í sambandi við, at løgtingslóg um loyvisgjald hevur verið broytt, ikki altíð hevur verið nøktandi. Í flestu førum eru broytingar gjørdar í sambandi við fíggjarlógararbeiðið og ofta við stuttum skotbrái.

Hesaferð varð endamálið við broytingini, heldur enn at tippa eitt hol í fíggjarlógini, politiska ynski um at ganga vinnuni á møti í mun til tær avbjóðingar, ið vórðu førdar fram í sambandi við tingviðgerðina av løgtingsmáli 093/2022. Eitt stórt arbeiði er gjørt at greina viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri eina slíka skipan. Sjónarmiðini um rætta tøkugjaldið eru mong. Harvið er semjan um eina tvíliðaða skipan, har allir semjupartarnir hava slakað í mun til teirra uppruna sjónarmið, ikki fullkomin. Kortini eigur skipanin at skapa støðufesti um karmarnar, sum føroyska alivinnan hevur at virka undir næstu árini.

Viðvíkjandi framleiðslukostnaðinum, so er hesin vorðin partur av tøkugjaldsskipanini eftir ynski frá vinnuni. Upprunaliga var hann hugsaður sum ein "botnur" undir stiganum – fyri fyrisitingina hevði tað verið munandi lættari, um farið verður aftur til gomlu skipanina.

Sambært semjuni kunnu tillagingar og broytingar gerast um allir semjuflokkar eru samdir um tað.

Dømi um slík viðurskifti kundu t.d. verið, um FishPool, sum er ein privat fyritøka, gevst at almannakunngera laksaprísir ella um laksaprísurin fellur munandi -fyri at nevna nøkur.

Ov høgt tøkugjald ávirkar møguleikarnar at gera íløgur

Í hesum sambandinum verður víst á, at tann framburður, ið hevur verið í føroysku alivinnuni seinastu árini, fyrst og fremst stavar frá íløgum í virksemi á landi.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Ásannandi týdningin av stóru íløgunum, ið áhaldandi hava verið gjørdar í nýggja tøkni og hættir at ala uppá, so skert ikki burtur, at framíhjárætturin til føroysku firðirnar eisini hevur ein týðandi leiklut í sólskinssøguni, ið er føroyska alivinnan. Landsstýrið metir, at nýggja skipanin eisini frameftir ger tað møguligt hjá alifyritøkunum at gera munadyggar íløgur, bæði fyri at vaksa og fyri at tryggja burðardygga aling.

Fíggjarmálaráðið

Fíggjarmálaráðið mælir til, at broytingar í tøkugjøldunum vera lagdar fyri Løgtingið, tá skipanin við serskatti er klár. Tað gevur møguleika fyri, at Løgtingið kann viðgera samlaðu skipanina undir einum, og í lógarfyrireikandi arbeiðinum kann neyðugt atlit verða tikið til møgulig ivamál, sum kunnu stinga seg upp við serskattinum.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Tað kunnu uttan iva vera fyrimunir við, at Løgtingið fær bæði lógaruppskotið um tøkugjald og lógaruppskotið um serskatt í einum.

Politiskt er kortini semja um at leggja uppskotið um tøkugjald fyri Løgtingið í hesi setuni og síðani leggja uppskotið um serskatt fyri Løgtingið í heyst. Hildið verður ikki, at tað er avgerandi fyri viðgerðina hjá Løgtinginum, at bæði uppskotini koma samstundis. Avgerandi fyri viðgerðina hjá Løgtinginum er, at avbjóðingar og ivamál, sum knýta seg at tøkugjaldinum eru væl lýst í hesum lógaruppskotinum, og at avbjóðingar og ivamál, sum knýta seg at serskattinum, verða væl lýst í uppskotinum sum kemur í heyst. Sum heild verður mett, at lógaruppskotið um serskatt er eitt sindur meira avbjóðandi fyrisitingarliga enn skipanin við tøkugjaldinum.

Fróðskaparsetur Føroya

Viðmerkingar frá Johan Ísak Hansen, fyrisitingarstjóra:

Á síðu 1: Vit fegnast um, at í viðmerkingunum til § 4 stendur at ætlanin er at 1% av inntøkunum frá tøkugjaldinum fer til at raðfesta gransking til frama fyri aling í Føroyum. Endamálið er at stuðla upp undir granskingarvirksemið á aliøkinum í breiðari merking.

Tað er sera kærkomið, at ætlan er um at seta 1% av inntøkunum frá tøkugjaldinum til at raðfesta gransking til frama fyri aling í Føroyum, men Setrið vil staðiliga mæla til, at hetta verður sett inn í sjálva lógina (eins og tað er tilskilað viðvíkjandi kommununum).

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Ætlanin er framvegis, at 1% av inntøkunum frá tøkugjaldinum fara til at raðfesta gransking.

Hoyringarskriv frá Hans Ellefsen, lektara:

Á síðu 2: Samanumtikið verður mett, at uppskotið er sera fløkt og ringt er at gjøgnumskoða, hvat avleiðingin av tí verður. Mælt verður til at bíða við at seta hetta uppskotið í verk fyrrenn tað er greinað víðari, um tað ikki kundi verið ein annan háttur, at kravt inn tilfeingisrentuna enn hesin hátturin, sum lógaruppskotið leggur upp til.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Ávísar broytingar eru gjørdar í mun til verandi lóg, men høvuðstættirnir eru teir somu, og tí verður ikki mett, at uppskotið er nógv flóktari ella verri at gjøgnumskoða enn galdandi lóg. Avgjaldsstigin virkar á sama hátt, hóast hesin er tillagaður, soleiðis at hann nú endar á 7,5% í mun til galdandi stiga, sum endar á 20%. Uppgerðin av kostprísinum er broytt, men er ikki trupul. Uppgerðin verður gjørd við støði í skjali 2.

Á síðu 4, um talvu 1: Vit síggja, at tað hevur ikki eydnast at fáa tilfeingisrentuna inn í serliga stóran mun tey seinastu árini við tøkugjaldi, tó varð størri partur av henni tikin inn árini 2020-2021. Sjálvsagt eru stórar óvissur í hesari útrokning.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Hugtakið tilfeingisrenta er, sum Hans Ellefsen eisini ger vart við, heft við stórari óvissu, tá hendan rentan skal gerst upp við støði í veruligum tølum. Til dømis verður eitt sokallað normalavkast á 6% nýtt í útrokningunum í talvu 1. Kortini kann spurnartekn verða sett við um eitt normalavkast á 6% er hóskandi fyri føroysku alivinnuna, ið er ein kapitaltung vinna, við stórum lívfrøðiligum váða, har stórar íløgur hava verið gjørdar seinastu árini. Harvið er sera torført at koma við einum neyvum úrslitið av, hvat tilfeingisrentan er.

Hartil kemur spurningurin um, hvussu stóran part av tilfeingisrentuni landið skal krevja inn. Hetta vil í síðsta enda altíð verða ein politisk avgerð. Mett verður, at skipanin, ið skotin verður upp at seta í gildi 1. januar 2025, gevur eitt munandi og hóskandi gjald til landskassan.

Metingin av í hvønn mun tað er eydnast at taka tilfeingisrentuna inn er gjørd við støði í teirri fortreyt, at alivinnan er ein tilfeingisvinna at líkna við fiskivinnuna. Her er viðkomandi at umhugsa, um alivinnan ikki eisini hevur eyðkenni til felags við framleiðsluvinnu og harvið liggur onkustaðni ímillum at vera ein tilfeingis- og framleiðsluvinna.

Á síðu 5: Ein orsøk til at strika progressivitetin sigur landsstýrið vera, at núverandi gjald stýrir atferðini hjá alifyritøkunum, tá tær skulu ger langtíðar sáttmálar. Men hetta eigur landið als ikki at taka atlit til. Landið

eigur at taka røttu leiguna fyri firðirnar og tað hevur einki samband við, um tað kann loysa seg at framleiða portiónir ella ei.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Tess progressivari tøkugjaldsstigin er, tess hægri gerst váðin hjá alifyritøkunum, tá hesar skulu gerða langtíðarsáttmálar, tað veri seg sáttmálar um portiónir ella heilan fisk. Ein slíkur avgjaldsstigi er tí atferðarstýrandi. Nýggi avgjaldsstigin, ið steðgar við 7,5%, er munandi minni progressivur og tí munandi minni atferðarstýrandi. Hetta er í tráð við semjuskjalið.

Á síðu 6: Eitt betri uppskot er at hyggja beinleiðis eftir, hvat tað er vit vilja leggja avgjald á og so leggja avgjald á tað. Tað, sum er avmarkaðað tilfeingi, eru firðirnir.

Svar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

At áseta eitt marknaðarligt leiguvirði á føroysku aliøkini er stórarbeiði, og hóast eitt slíkt arbeiði bleiv gjørt til fulnar, so slepst ikki undan ávísari óvissu. Tí er slík loysn ikki partur ev hesi semju, sum strekkir seg fram til 2032. Um tað við tíðini ber til at menna eina gjaldsskipan, ið tekur støði í einum marknaðarligum leiguvirði av teimum føroysku firðunum, eigur hetta sjálvandi at verða umhugsað.

Á síðu 7: Ein onnur loysn, sum hevur verið nevnd, er bert at áseta ein eyka partafelagsskatt til alivinnufyritøkur. Men um tað almenna bert ásetur ein eyka yvirskotsskatt, fara fyritøkur innan aling at hava eina áeggjan til ikki at fráboða eitt veruligt yvirskot til tað almenna, tí verður í Noregi brúktir sokallaðir 'normprísir', har prísirnir verða ásettir útfrá altjóða marknaðinum.

Svar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Tað eru fleiri ið ynskja sær, at einans skattaamboðið verður nýtt, tá alivinnan skal rindað fyri framíhjárættin at nýta føroysku firðirnar, sí hoyringarsvarini hjá Havbúnaðarfelagnum og Landsbankanevndini. Fyrimunir og vansar eru við teimum ymisku skipanunum og sum Hans Ellefsen vísur á, eru vandar eisini við at nýta eina reina skattaskipan. Norska skipanin er t.d. sera tung at umsita og ivasamt er um ein slík skipan hevði egnað seg til føroysk viðurskifti. Tí er semja nú um at nýta eina tvíliðaða skipan, har tøkugjaldið saman við einum eyka skatti skal tryggja, at landið fær eitt munandi og hóskandi gjald frá alivinnuni afturfyri framíhjárættin at nýta aliøkini.

Á síðu 8: Samanumtikið eru nógvir spurningar eftir at verða svaraði í hesum lógaruppskotinum. Avleiðingarnar eru sera ringar at útgreina og vita vit ikki, hvat fer at koma inn við hesi skipanini komandi árini, men neyvan verður tað tilfeingisrentan. Serliga tá hugsað verður um, at hetta uppskotið skal verða galdandi í nógv ár fram, er tað tí neyðugt at gera eitt størri greiningararbeiði til tess at finna ta røttu skipanina fyri at fáa eitt leigugjald inn fyri føroysku firðirnar.

Svar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Tað er rætt, at øll tilfeingisrentan ikki verður tikin inn við nýggja uppskotinum og hevur tað ikki verið ætlanin. Tað er eydnast at finna eina breiða politiska semju um eina tvíliðaða skipan, sum tekur eitt munandi og rímiligt gjald frá alivinnuni aftur fyri framíhjárættin at nýta aliøkini. Ein slík skipan, hóast lýtir, tryggjar støðugar avgjaldskarmar kring føroysku alifyritøkurnar næstu árini. Neyvan finst ein fullkomin avgjaldsskipan, og tí er at fegnast um, at tað er hepnast hjá samgonguni saman við Sambandsflokkinum at gera eina langtíðarsemju um eina tvíliðaða skipan.

Hoyringarsvar frá Zvonko Mrdalo, adjunkti

A síðu 9: *1.* Framleiðslukostnaður): The average ratio between those two variables was 2.85 for the analyzed period. Consequently, the overall real production costs will be underestimated.

Svar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Zvonko Mrdalo vísur á, at avskrivingarnar hjá alifyritøkunum strekkja seg yvir lutfalsliga nógv ár, og tí verður "veruligi framleiðslukostnaðurin" nakað undirmettur. Hetta er tó ein avleiðing av, at framleiðslukostnaðurin veður gjørdur upp á ein einfaldan hátt, har høvuðspostarnir í rakstrarroknskapinum verða nýttir í uppgerðini av framleiðslukostnaðinum. Hildið verður fast við hendan útrokningarhátt, har framleiðslukostnaðurin verður útroknaður 3. hvørt ár og prístalsviðgjørdur árini harímillum.

Á síðu 9: 1. (Framleiðslukostnaður): It is further proposed to attach each company's equal weight to derive an average cost for the industry. The correct way would be to apply each company's production cost given the considerable differences in their production profiles and product

Svar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Ein loysn, har einstøku alifyritøkurnar gera upp sín egna framleiðslukostnað hevði merkt, at tær ikki rinda sama prosentsats í tøkugjaldi í sama tíðarskeiði. Harumframt hevði ein slík loysn sannlíkt sett størri krøv í mun til eftirlit í samband við, at einstaka alifyritøkan ásetti sín egna framleiðslukostnað. Hetta ynskja semjupartarnir ikki.

Á síðu 9: 2. (Prístalsviðgerð av metta miðal framleiðslukostnaðinum PK): The document proposes the usage of CPI from the Faroese statistical agency to adjust the production costs. While such a measure is readily available, the index does not measure changes in production costs. The correct way would be to use (create) the Producer Price Index by FO Salmon Industry. Secondly, each company's feed costs will be given equal weight, which might not reflect the proper cost structure due to differences in feed origins. A 50% weight se reasonable given the historical shares for the cost of feed.

Svar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Tað finst í løtuni ikki eitt "Producer Price Index" fyri føroysku alifyritøkurnar. At framleitt eitt slíkt hevði fyri Hagstovuna verið ein drúgv og kostnaðarmikil verkætlan, og tí verður hildið fast við vanliga prístalið.

Á síðu 10: 4. (Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur): Based on crude calculations from Table 1 (p.12), it has been asserted that due to anticipated lower resource fee payments, the result after tax will be higher. This seems to imply that there is a linear relationship between these two variables which might not be the case in practice. Secondly, there are expectations of higher dividends without properly accounting for the additional 8% CT charges (p.13).

Svar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Tað er rætt, at óvissa enn er um fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunur. Talan er um eina tvíliðaða skipan, sum fær gildi 1. januar 2025. Í samband við at lógaruppskotið um skattapartin verður fyrireikað í heyst, verður ein neyvari meting gjørd, har avleiðingarnar fyri land og kommunur verða lýstar.

Landsbankanevndin

Hoyringarsvarið hjá landsbankanevndini tekur støði í tí, sum professari Karen Helene Ulltveit-Moe førdi fram á tilfeingisráðstevnuni, sum Búskaparráðið skipaði fyri í mars 2023. Í svarinum verður tikið aftur í fleiri viðurskifti, sum vórðu tikin upp á ráðstevnuni. Eitt nú at umhvørvisligu fortreytirnar fyri at ala í Føroyum eru góðar, og at tað framvegis er neyðugt við stórum íløgum.

Í mun til val av avgjaldsskipan verður víst á týdningin av at hesar eru samansettar soleiðis, at tað ikki ávirkar annars skilagóðar fíggjarligar avgerðir, ella eru beinleiðis viðvirkandi til suboptimering. Somuleiðis verður víst á, at tað er umráðandi at avgjaldsskipanin ikki førir til lægri íløgur. Mælt verður til at tilfeingisrentan verður tikin inn umvegis partafelagsskattin, tí at ein slík skipan virkar minst skeiklandi fyri atburðin hjá alivinnuni.

Harvið verður mælt frá einari tvíliðaðari skipan við einum tøkugjaldi og eini skipan við einum serskatti. Heldur verður skotið upp at fara yvir til eina skipan við einum eyka skatti á yvirskotið frá sjógvalingini.

Eisini verður víst á, at skattaskipanir ávirka kappingarførið hjá útflutningsvinnum.

Harumframt verður víst á, at ein av høvuðsorsøkunum til endurskoðanina av tøkugjaldinum var atlitið til meirvirking í Føroyum og at hetta uppskotið í stóran mun ikki bøtir um hesa avbjóðing.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Yvirskipað verður í svarinum hjá landsbankanevndini mælt til at skifta til eina skipan, har yvirskot frá virkseminum í sjófasuni verður skattað við einum eyka skatti.

Fyrimunir og vansar eru við eini slíkari skipan eins og fyrimunir og vansar eru við tøkugjaldsskipanini. Undir ávísum givnum fortreytum kunnu flestu búskaparfrøðingar verða samdir um, at ein skattabaserað skipan er minni órógvandi og minni atferðarstýrandi, enn ein bruttoskipan, sum tøkugjaldsskipanin er. Kortini eru fólk ymisk á máli um, hvussu væleydnað norska skipanin í veruleikanum er. Har eru sanniliga eisini lýtir, sum áleggja almennu myndugleikunum stórar og kostnaðarmiklar eftirlitsuppgávur. Ikki er vist, at norska skipanin, sum hon er samansett í dag, hevði hóskað til føroysku alivinnuna.

Tí er ein tvíliðað skipan, har einfalda tøkugjaldsskipanin er ein týðandi partur, meðan ein eykaskattur er annar týðandi partur, ein loysn sum semjupartarnir ynskja at royna í verki. Ein slík skipan skal tryggja at alifyritøkurnar gjalda eitt munandi og rímiligt gjald fyri framíhjárættin at gagnnýta føroysku firðirnar.

TAKS

Í sambandi við at uppskotið varð sent út í almenna hoyring hevur TAKS gjørt viðmerkingar til § 3, § 6 og § 8.

Til § 3, stk. 4

TAKS mælir til at orðingin: “Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu” verður sett inn aftaná seinasta punktum.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Uppskotið er tillagað samsvarandi.

Til § 6

Í viðmerkingunum verður víst á, at tað reint fyrisitingarliga kann verða ein avbjóðing, at TAKS skal hava eftirlit við framleiðslukostnaðinum, sum stovnurin ikki hevur ábyrgd av at gera upp.

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Uppgávan at gera framleiðslukostnaðin upp liggur hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Av tí at talan er um eina uppgerð, ið er avgerðandi fyri, hvussu høgt prosent alivinnan skal rinda í tøkugjaldi og sum partvíst eisini knýtir í innanhýsis handil í samtøkum, er neyðugt at til ber at eftirkanna viðkomandi viðurskifti um tørvur gerst á tí. Sambært galdandi løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu er TAKS myndugleiki og tískil er tað nærliggjandi at eftirlitsuppgávan verður løgd til TAKS.

Til § 8

Í viðmerkingunum verður víst á, at TAKS ynskir at pantiheimildin í § 8 verður orðað soleiðis:

"Avgjald, skattur og sekt, sum stava frá hesi løgtingslóg, og eru fallin til gjaldingar, kunnu saman við rentum og innkrevjingarkostnaði verða innheintað við panting.

Stk. 2. TAKS fremur pantingina eftir reglunum fyri innheinting av skattum, tó er § 7, stk. 1 í lov for Færøerne om inddrivelse af skatter og afgiter til det offentlige m.m. ikki galdandi."

Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

Landsstýrismaðurin tekur undir við, at lógaruppskotið verður broytt samsvarandi.